# planet.fo Awards



# Tilnevningar

**Listin yvir tilnevnd nøvn á Planet Awards er nú liðugur. Tú kanst inntil á miðdegi fríggjadagin vera við til, at avgera hvør fer við planetunum**

PLANET AWARDS
*Niels Uni Dam*
*post@sosalurin.fo*

Fríggjakvøldið verður Planet Awards hildið í Miðlahúsinum í Vágsbotni. Planet.fo, Sosialurin og Rás 2 heiðra hetta kvøldið føroyskum tónleiki. Ein serliga útvald dómsnevnd hevur arbeitt við at tilnevna tey nøvnini, ið skulu býta tær 30 tilnevningarnar í millum sín. Hvør situr í dómsnevndini verður almannakunngjørt á Planet Awards tiltakinum, hetta er ikki tí, at nakað er at dylja um dómsnevndina, men bert fyri at geva henni arbeiðsfrið, til hon hevur atkvøtt endaliga. Dómsnevndin er komin til sína niðurstøðu um hvørs avrik í 2007 eru nóg góð til at verða innstillaður. Á hesum síðum er yvirlit yvir tær seks vanligu planetirnar og yvir hvørji nøvn eru í kappingini um at ogna sær eina av eyðkendu Igulkers heiðurslønunum.

**Tú kanst vera við til at avgera vinnaran**

Limirnir í dómsnevndini atkvøða hvør í sínum lagi millum tey fimm nøvnini, ið eru tilnevnd til hvørja planet, og teirra samlaðu atkvøður telja helmingin av endaliga úrslitinum.

Hin helmingin av úrslitinum skal almenningurin gera av. Fólk fáa møguleikan at atkvøða umvegis sms, og síðani verða atkvøðurnar hjá fólki og dómsnevndini taldar saman til eitt endaligt úrslit, sum verður almannakunngjørt á Planet Awards í Miðlahúsinum og á Rás 2.

Fyri at atkvøða send eini sms boð til 1930, við koduni, ið stendur aftan fyri tað navnið, ið tú vilt atkvøða fyri. Hvørt sms kostar 5 kr, og tú hevur loyvi at atkvøða einaferð fyri hvørja planet. Øll føroysk fartelefonhald bæði hjá Føroya Tele og hjá Kallli kunnu luttaka.

Tey, ið eru við í atkvøðugreiðsluni taka samstundis lut í lutakasti um fleiri góðar vinningar:

## Ársins føroyska fløga














Káta Hornið – Teitur ........................................................ pla bu1
Let Your Scars Dance – Lena Anderssen ........................... pla bu2
Love Is Dead - Guðrið Hansdóttir ...................................... pla bu3
Pandemonium - Sic ........................................................... pla bu4
Stories of Devils, Angels, Lovers and Murderers - Budam .... pla bu5

## Ársins føroyska tónleikanavn











Boys In a Band ............................... pla bf1
Budam ............................................ pla bf2
Guðrið Hansdóttir ........................... pla bf3
Sic .................................................. pla bf4
Teitur .............................................. pla bf5

## Ársins sangari











Heiðrikur á Heygum ......................................... pla bs1
Jógvan Hansen .................................................. pla bs2
Mikkjal G. Hansen ............................................. pla bs3
Pætur Zachariassen ........................................... pla bs4
Teitur ............................................................... pla bs5